# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Tað skelkar meg sum landsliðsvenjara at síggja, hvussu stórt spennið er frá teimum, sum eru best fyri, til teir, sum eru ringast fyri.*

*Jógvan Martin Olsen, landsliðssvenjari í fótbólti*

# Føroyskir spælarar halta aftaná elituni



*Føroysku landsliðsspælararnir í fótbólti eru langt frá so væl fyri kropsliga, sum útlendsku yrkisspælararnir, sum teir spæla altjóða dystir ímóti*

**Føroyskir fótbóltsspælarar eru langt frá so væl fyri kropsliga, sum elituspælarar úti í heimi. Bæði tá tað kemur til kondtión, skjótleika og eksplosivitet eru føroyskir spælarar munandi verri fyri enn yrkisspælarar uttanlands. Landsliðsvenjarin sigur seg verða skelkaðan av, hvussu illa summir føroyskir spælarar eru fyri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyskir fótbóltsspælarar skulu venja meira miðvíst, um teir skulu standa mát við kropsligu førleikararnar hjá yrkisspælarum uttanlands.

Tað er niðurstøðan hjá Jógvani Martini Olsen, landsliðsvenjara, í eini grein í nýggja FSF-blaðnum.

Samanhangandi kanningar eru seinasta árið gjørdar av føroysku landsliðsspælarunum í fótbólti, og hesar kanningar staðfast turt og greitt, at stórur munur er millum ein føroyskan landsliðsspælara og ein franskan ella italskan landsliðsspælara.

Bæði tá tað snýr seg um kondition, skjótleika og ekplosivitet eru føroysku spælararnir verri fyri enn heimselitan.

Størsti munurin er í tí, sum verður rópt anaerobum eginleikum. Hetta sigur nakað um førleikararnar hjá spælarunum at arbeiða við maximalari orku í stutta tíð. Her eru føroysku spælararnir 30 prosent aftan fyri heimselituna, men á øllum økjum tiva føroysku spælararnir aftaná teimum útlendsku elituspælarunum.



*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari í fótbólti, vil hava føroyskar fótbóltsspælarar í betri kropsligan form*

## Skelkandi

Kanningarnar av forminum hjá føroysku landsliðsspælarunum vísa, at tað er ymiskt, hvussu væl spælararnir eru fyri.

Eini 20 til 30 prosent av spælarunum eru í nøktandi venjingarstøðu. Eini 30 prosent eru ikki í nøktandi venjingarstøðu, og heili 40 prosent eru í vánaligari venjingarstøðu, tá tað verður samanborið við yrkisspælarar á hægsta stigi uttanlands.

- Tað skelkar meg sum landsliðsvenjara at síggja, hvussu stórt spennið er frá teimum, sum eru best fyri, til teir, sum eru ringast fyri. Her er munurin alt ov stórur, sigur Jógvan Martin Olsen í grein í FSF-tíðindi.

## Gongdin skal broytast

Fótbóltssambandið ætlar sær ikki bara at staðfesta støðuna, og so einki gera við hana. FSF fyrireikar nú eina nýggja test-skipan, sum feløgini kunnu brúka til at kanna, hvussu teirra spælarar eru fyri kropsliga.

FSF hevur ognað sær útgerð til at gera hesar kanningar, og ætlanin er, at feløgini skulu umbiða kanningar frá FSF. Tá feløgini vilja hava sínar spælarar kannaðar, verða boð send eftir umboðum frá FSF, sum koma út til feløgini at testa spælararnar.

Ætlanin er, at hetta arbeiða skal verða afturvendandi, so at feløgini eisini fáa at vita, hvussu spælararnir taka seg fram, og hvørja ávirkan venjingin hevur á spælararnar.

- Eg eri vísur í, at taka vit av møguleikanum at brúka hetta amboðið í tí dagligu fótbóltsvenjingini, vilja vit síggja ein vaksandi áhuga hjá leikarunum sjálvum, og hetta vil økja um tilvitanina í at røkja og betra um sítt egna venjingarstøði, sigur Jógvan Martin Olsen.

- Vónandi kunnu allir partar taka lógvatak saman fyri at hækka stæðið munandi til frama fyri leikaran, felagið, landsliðið og føroyskan fótbólt, sigur hann.

## Venjararnir hava ábyrgd av fráfalli

**Fótbóltssamband Føroya hevur gjørt ein kanning av fráfalli millum ungar fótbóltsspælarar, og venjararnir mugu taka ábyrgdina á seg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trý av hvørjum fýra børnum byrja at spæla fótbólt, men tá ið tey gerast 16 ára gomul eru bert 33 prosent av børnunum eftir í fótbóltsspælinum.

Tað er ein av niðurstøðunum í einari kanning, sum Fótbóltssambandið hevur gjørt av fráfallinum millum ungar fótbóltsspælarar.

Endamálið við kanningini var at fáa eina hóming av, hví so nógvir ungir fótbóltsspælarar gevast at spæla fótbólt áðrenn teir verða 16 ára gamlir.

Kanningin staðfestir, at tað eru tríggjar høvuðsorsøkir til, at spælarar halda fram at spæla fótbólt. Fyrst orsøkin er av sosialum slagi, tí børn og ung vilja verða saman við vinum í ítrótti. Síðani er ein orsøk, at børnini vilja mennast sum ítróttarfólk, og ein triðja orsøk er viljin til at vinna.

Fótbóltssambandið heldur, at venjararnir hava eina stóra ábyrgd mótvegis teimum ungu fótbóltsspælarunum, og venjarin stendur sentralur í orsøkini til, hví børn gevast at spæla fótbólt.

-Tað er nógv, sum bendir á, venjarin og umstøðurnar at venja undir eru høvuðsorsøkin til stóra fráfallið. Meginparturin av spælarunum spæla fótbólt av sosialum orsøkum, og júst orsøkin, at tað ikki er stuttligt, er ein stór orsøk til, at leikarar gevast, skrivar Pætur Clementsen í seinastu útgávuni av FSF-blaðnum. Hann stóð fyri kanningini av fráfallinum.

- Venjarin ger venjingarnar og hevur tí beinleiðis ávirkan á, um tað er stuttligt ella ikki. Tí kann tað hugsast, at tað er meira ella minni orsaka av venjaranum, at børn gevast at spæla fótbólt, sigur hann í viðmerkingunum til kanningina.